## 11 ferðir Othello

Shakespeare-leikurin Othello verður framførdur 11 ferðir í sjónleikarhúsinum í mai. Fyrsta framsýning var sunnukvøldið 4. mai. Og seinasta sýning verður mikukvøldið. Allara sýningarnar byrja klokkan 20. Atgongumerki fáast á Kunningarstovuni og ein tíma undan sýning í Sjónleikarhúsinum. Kostnaðurin er 125 krónur, men lesandi og bólkar á 10 og fleiri fáa atgongumerki fyri 100 krónur.



## Gentur skuldseta prest

Løgreglan í íslendsku bygdini Selfossi fer nú at kanna, um presturin í bygdini, Gunnar Björnsson, skal skuldsetast fyri at hava verið ónærisligur við ungar gentur. Fyri nøkrum døgum síðani vendu tvær ungar gentur sær til løgregluna og greiddu frá, at tær høvdu verið fyri kynsligum ágangi frá presti, og í gjár fekk løgreglan somu frágreiðing frá einari gentu afturat. Løgreglan vil ikki siga meiri um málið, fyrr enn genturnar eru avhoyrdar, skrivar Vísir.

# Sundalagið mótmælir

**- Vit heita staðiliga á SEV um at gera upp við henda "alt ella einki" hugburð og lata áirnar fáa frið – ella lata ein part at vatninum renna, so alt lív í áunum ikki verður týnt, siga tey, sum mótmæla Eiði2 verkætlanini hjá SEV**



MÓTMÆLI

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í dag klokkan 14 skuldi Elsa Annika Olsen, sum býr við Norðskála, handa landsstýriskvinnuni í vinnumálum, Bjørt Samuelsen, einar 500-600 undirskriftir sum mótmæli ímóti Eiði2 verkætlanini hjá SEV.

Umframt at handa landsstýriskvinnuni í vinnumálum undirskriftirnar, er mótmælisskrivið eisini stílað til landsstýriskvinnuna í lógarmálum, Helenu Dam á Neystabø, Elfelagið SEV, Sunda kommunu, Yvirfriðingarnevndina og Friðingarnevndina í Eysturoy.

### Gevandi stað

Í skrivinum verður inniliga heitt á avvarðandi myndugleikar um at vísa hógv, nú farið verður víðari við vatnorkuútbyggingini hjá SEV í Eysturoy.

- Nú so nógv nýtt er komið fram á umhvørvisøkinum, meta vit tað ikki vera rætt at taka alt vatnið úr áunum og harvið týna alt lív, sum í teimum er.

Lagt verður aftrat, at áirnar eru eitt gevandi stað, bæði fyri stór og smá – til likams og sálar.

- Áirnar eru ímyndin av tíðini sum var, tíðini sum er – og vónandi eisini tíðini sum kemur.

### Alt ella einki

Í mótmælinum verður heitt á SEV um at gera upp við hendan "alt ella einki" hugburð og lata áirnar fáa frið – ella at lata partar av vatninum renna, so lívið í teimum ikki verður týnt.

Tey, sum mótmæla, siga seg hóma eina vón, tí SEV-stjórin í Degi og Viku, 11. mars í ár, segði, at sjálvt um arbeiði er farið í gongd, er ikki ov seint at venda aftur.

Hetta halda tey, sum standa aftanfyri savnanina av undirskriftum, vera eina vón, nú tey heita á SEV um at vísa hógv við umhvørvinum.

### Fylgiskjal

Elsa Annika Olsen, sum hevur tikið stig til savnanina av undirskriftum, sigur við Sosialin, at tey mest bara hava savna undirskriftir í bygdunum nærindis Norðskála.

- Tað er ikki soleiðis, at hetta er ein landsdekkandi innsavnan. Vit hava savnað undirskriftir í bygdunum her um leiðir, og so hevur onkur av okkum, sum hevur luttikið í átakinum, havt pappírini við sær, so fólk, tey hittu á leiðini, eisini fingu høvi at skriva undir.

Øll, sum hava skrivað undir mótmælisskrivið, eru 18 ár og eldri.

- Aftrat arkinum, sum hevur fylgt blaðnum til undirskrivingar, hava vit eisini eitt fylgiskjal, sum fólk, ið hava ynskt tað, hava kunnað sæð, sigur Elsa Annika Olsen, stigtakari.

Sosialurin endurgevur partar av fylgiskjalinum aðrastaðni á hesi opnuni.